## Belgiari í Listaskálanum

Fríggjadagin klokkan 16.00 letur Listasavn Føroya upp fyri nýggjari framsýning við 100 grafiskum listaverkum av heimskenda belgiska listamanninum, Pierre Alechinsky, ið er føddur í 1927. Listaverkini eru gjørd í einum 40-ára tíðarskeiði frá 1963 til 2002. Framsýningin er fingin í lag við víðagitna grafiska verkstaðin Editions Atelier Clot, Bramsen & Georges í París, haðani øll verkini eru prentað, og sum danski steinprentarin, Peter Bramsen, hevur staðið á odda fyri síðan 1960-árini. Pierre Alechinsky hevur í mong ár verið ein av stóru listamonnunum á altjóða listapallinum.



## Átalar Tórshavnar Kommunu

Løgtingsins Umboðsmaður hevur givið Tórshavnar kommunu átalu í sambandi við eina starvssetan. Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um viðgerðina hjá Tórshavnar Tveir umsøkjarar vóru bodnir til setanarsamrøðu. Hvørgin teirra var verkfrøðingur. Einasti umsøkjarin, ið hevði eina útbúgving, ið samsvaraði við starvslýsingina, var klagarin, sum eisini hevði viðkomandi arbeiðsroyndir til starvið. Umboðsmaðurin sigur, at einki tilfar í málinum vísti, hví klagarin ikki varð boðin til samrøðu ella sett í starv, og tí hevur Umboðsmaðurin givið Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri hetta.




## Miðfloksveljarar ósamdir við tingmanning

Tingmanningin hjá Miðflokkinum er á einum máli um, at Føroyar eiga at verða eitt valdømi, men hesum eru veljarar floksins als ikki samdir í. Í øllum hinum flokkunum er greiður meiriluti fyri einum valdømi, men millum miðfloksveljarar er meirilutin eins stórur ímóti uppskotinum. Heili 54 prosent av teimum spurdu miðfloksveljarunum eru ímóti, meðan einans 31 prosent eru fyri einum valdømi. Fólkafloksveljarar eru við 31 prosentum ímóti, tann bólkurin, har mótstøðan er næst størst, men í hesum bólki er tó greiður meiriluti fyri, við 55 prosentum fyri, at Føroyar gerast eitt valdømi.
Bestu undirtøku fær uppskotið millum veljarar hjá Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, har ávikavist 69 og 66 prosent eru fyri, at Føroyar verða eitt valdømi.

| Flokk | Fólkafl | Sambandsfl | Javnaðarfl | Sjálvstýrisfl | Tjóðveldisfl | Miðfl | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 55% | 54% | 60% | 66% | 69% | 31% | 56% |
| Nei | 31% | 23% | 23% | 29% | 21% | 54% | 26% |
| Veit ikki | 14% | 23% | 17% | 5% | 10% | 16% | 18% |
| Samlað | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% |




## Størst mótstøða millum tey yngstu

Tað eru yngstu veljararnar, teir ímillum 18-24, ið vísa mest fyrivarni mótvegis uppskotinum um at gera Føroyar til eitt valdømi. Meðan tað í øllum øðrum aldursbólkum er greiður meiriluti fyri uppskotinum, so stendur á jøvnum millum tey, ið eru fyri, og tey, ið eru ímóti. 39 prosent eru fyri og 39 prosent ímóti. Sostatt eru eisini 22 prosent av teimum yngstu, ið ikki hava tikið støðu. Einasti bólkur har størri partur ikki hevur tikið støðu enn, er tey, ið eru yvir 60 ár. Í elsta bólkinum eru 24 prosent, ið ikki hava tikið støðu enn, men millum tey, ið hava tikið støðu í hesum bólki er greiður meiriluti fyri uppskotinum, heili 54 prosent eru fyri, at Føroyar gerst eitt valdømi.

| Aldur | 18-24 | 25-39 | 40-49 | 50-59 | 60+ | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 39% | 59% | 71% | 59% | 54% | 56% |
| Nei | 39% | 27% | 15% | 28% | 22% | 26% |
| Veit ikki | 22% | 14% | 14% | 13% | 24% | 18% |
| Samlað | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% |




## Javnt millum kynini

Mannfólk og konufólk eru rættiliga samd um at vera fyri einum valdømi. Kortini eru mannfólkini eitt sindur positivari enn kvinnurnar. Eisini eru fleiri kvinnur enn menn, sum siga seg ikki vita.

| Kyn | Kvinna | Maður | Samlað |
|---|---|---|---|
| Ja | 52% | 60% | 56% |
| Nei | 25% | 27% | 26% |
| Veit ikki | 23% | 13% | 18% |
| Samlað | 100% | 100% | 100% |